*– Vit seta okkum í vanda fyri neyðtøku, men bjarga monnunum*

*kvinna í Darfur*

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK
TLF 341800

ÚTLOND

# Í Darfur eru neyðtøkur gerandiskostur



*Tær seinastu vikurnar eru umleið 200 kvinnur neyðtiknar í Darfur*

**Kvinnurnar í Darfur verða illa viðfarnar, tí friðarhermenninir klára ikki at verja sivilfólkið.**

Tær seinastu fimm vikurnar hava minst 200 kvinnur í flóttafólkaleguni Kalma í sudanska landspartinum Darfur boðað frá, at tær eru vorðnar neyðtiknar. Fyrr vóru neyðtøkurnar tvær ella tríggjar um mánaðin, men í seinastuni er talið vaksið óhugnaliga nógv, skrivar Reuters.

Tær flestu neyðtøkurnar eru, tá kvinnurnar noyðast úr leguni út í skógin eftir brenni, og í fleiri førum er gentur niður í 13 ára aldur neyðtiknar. Aðrar, sum eru slopnar undan neyðtøku, hava greitt frá, at tær eru voðnar slignar og sparkaðar.

Tað hevur altíð verið vandamikið hjá kvinnunum at fara úr legunum í Darfur. Tí bleiv avgjørt, at hermenninir hjá afrikanska eindarfelagsskapinum skuldu verja tær, men royndirnar vísa, at hermenninir eru so fámentir, at teir megna ikki uppgávuna. Harafturat hevur tað víst seg, at verða menninir sendir eftir brenni, koma bara nakrir fáir aftur á lívi. Tí fara kvinnurnar heldur avstað.

– Vit hava valt at fara, sjálvt um vit kunnu vænta at verða neyðtiknar, men á tann hátt kunnu vit bjarga monnunum, sigur ein av kvinnunum við hjálparfelagsskapin International Rescue Committee.

IRC stórur fyri, at viðurskiftini fara at versna seinni, tí tann 30. september fara teir afrikonsku friðarhermenninir úr Darfur. Tá skulu ST-hermenn ætlandi taka við eftirlitinum, og Kodi Annan, aðalskrivari, hevur skotið upp at senda 22.000 hermenn til landspartin. Sudanska stjórnin vil ikki hava ST-hermenn til Darfur, men USA og Bretland hava gjørt greitt, at hermenn verða sendir hagar, sama hvat sudanska stjórnin sigur.

# Drepandi hjartasorg

**Tann 26 ára gamli Christopher Williams gjørdist frá sær sjálvum, tá hann fekk krakk frá unnustuni.**

Amerikanarin Christopher Williams gjørdist púra frá sær sjálvum, tá unnusta hansara, Andrea Lambesis, segði honum, at nú var liðugt teirra millum. Tað kom at kosta tveimum fólkum lívið.

Fyrst myrdi hann sína fyrrverandi vermóður, ta 57 ára gomlu Lindu Lambesis. Síðani setti hann seg í bilin og koyrdi til skúlan, har fyrrverandi unnustan er lærari. Tá hann ikki fann hana, skeyt hann starvsfelaga hennara, ta 56 ára gomlu Mary Shanks, sum doyði av skotunum.

Haðani fór Christopher til eitt íbúðarøki, har hann særdi ein vinmann, tann 26 ára gamla Chad Johansen.

Síðani vendi hann byrsuni ímóti sær sjálvum, men hóast hann skeyt tvær ferðir, doyði hann ikki. Løtu seinni kom løgreglan á staðið og tók hann.

## STUTT SAGT

### Fýra ár í Gunatanamo

Tann 24 ára Murat Kurnaz, sum er av turkiskum uppruna, men sum hevur búð í Týsklandi í fleiri ár, er komin til Týsklands eftir at hava verið fýra ár í amerikonsku fangaleguni Gunatanamo í Kuba.

Kurnaz, sum í týskum fjølmiðlum hevur verið umrøddur sum „Talibanin úr Bremen", varð tikin í Pakistan stutt eftir atsóknina at USA tann 11. september í 2001. Har sat hann í fongsli í eitt ár og varð síðani fluttur við flogfari til Guantanamo, tí amerikanararnir høvdu illgruna um, at hann var limur í yvirgangsfelagsskapinum al-Qaeda.

Murat Kurnaz hevur alla tíðina noktað seg sekan, og amerikonsku myndugleikarnir hava heldur ikki kunnað prógva, at hann hevur havt samband við al-Qaeda. Kortini er tað ikki vist, at hann sleppur at verða verandi í Týsklandi, tí ákæruvaldið í Bremen er í ferð við at kanna tíðindi um, at hann var við til at stovna ein kriminellan felagsskap. Kann tað prógvast, verður Kurnaz helst vístur úr Týsklandi, skrivar DPA.

### Faklærd rýma úr Eysturevropa

Tey seinastu árini eru handverkarar í túsundatali farnir úr teimum eysturevropeisku londunum til Vesturevropa at arbeiða, og tað hevur gjørt, at nú er trot á faklærdum fólki har.

Eitt nú eru nógvir polskir handverkarar farnir til Noregs at arbeiða, men nú vísir tað seg at vera óheppið fyri norðmenn. Norska sjóverjan hevur bílagt eitt verjuskip frá einari skipasmiðju í Sezcecin, men har er ikki nóg mikið av elektrikarum og rørleggjarum, og tí er byggingin seinkað einar tveir mánaðir, skrivar NTB. Leiðslan á skipasmiðjuni sigur, at ein dagin møttu átjan rørleggjarar til arbeiðis, men dagin eftir vóru bara tríggir eftir, tí hinir vóru farnir av landinum at arbeiða.

Hildið verður, at umleið tvær milliónir pólendingar eru farnir vesturum at arbeiða, men serliga Estland, Letland og Litava eru meint rakt av, at fólk í stórum tali velja at leita sær av landinum at arbeiða. Í fjør fluttu meiri enn 15.000 fólk úr Litava, og síðani landið fekk sjálvsstýri frá Sovjetsamveldinum í 1991, er fólkatalið minkað 334.000.

### Vilja ikki til Irak

Higartil hevur amerikanski herurin havt nóg mikið av hermonnum, sum sjálvboðnir hava boðið sær til at gera tænastu í Irak, men soleiðis er ikki longur.

Tað hevur havt við sær, at nógvir hermenn noyðast at verða verandi í Irak nógv longri enn upprunaliga ætlað, og nógvir noyðast aftur til Irak eftir at hava verið heima eina tíð, og fleiri hava longu verið har bæði tvær og tríggjar ferðir. Men hermannalívið í Irak er strævið bæði likamliga og sálarliga, og hugurin at fara hagar er lítil.



*Amerikanskir hermenn vilja ikki til Irak.*

Guy Stratton, oberstur, sigur við The Christian Science Monitor, at herurin arbeiðir við at senda boð eftir 2.500 hermonnum, sum fáa álagt at fara til Irak, og teir verða neyvan teir einastu, sum fáa slík boð, sigur hann.